VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Frágreiðing um burðardygd 2023



# Innihaldsyvirlit


**1.** **Fororð** 4

**2.** **Um Føroya Arbeiðsgevarafelag** 4

**3.** **ESG-lyklatøl** 6

**3.1 CO2-útlát og orkunýtsla** 8

**3.2 Burturkast** 9

**3.3 Sosialt** 9

**3.4 Leiðsla** 9

**Fylgiskjøl**
Vegleiðing til uppgerð av ESG-lyklatølum 12


## *Um Føroya Arbeiðsgevarafelag*

*Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar á privata arbeiðsmarknaðinum og er røddin hjá privatu vinnuni á vinnupolitiskum og arbeiðsmarknaðar-økinum. Felagið eigur og rekur Vinnuhúsið, har skrivstovan hjá felagnum heldur til.*

# Fororð



Føroya Arbeiðsgevarafelag vil taka atlit til burðardygd í øllum virkseminum hjá felagnum. Okkara visión er at føroyskt vinnulív fær teir bestu møguleikarnar fyri at kappast, mennast og framleiða varandi virði. Varandi virði kunnu bert framleiðast, um virksemið er burðardygt yvir tíð.

Tí hava vit valt á hvørjum ári at geva út eina burðardygdsfrágreiðing, sum verður løgd við árligu ársfrágreiðingina. Henda fyrsta frágreiðingin er avmarkað í vavi, men vit hava valt at byrja í smáum, og so við tíðini útbyggja frágreiðingina.

Fyri føroyskar vinnufyritøkur er alneyðugt at raðfesta burðardygd. Tað liggur ein ábyrgd á vinnuni at tryggja, at virksemið verður framt á ábyrgdarfullan hátt, soleiðis at bæði umhvørvisliga og sosiala tilfeingið verður gagnnýtt við skynsemi. Eisini er burðardygd eitt strategiskt týdningarmikið øki fyri føroyskar fyritøkur. At fyritøkur kunna vísa á, í hvønn mun virksemið er burðardygt, kann ávirka áhugan at keypa vørur ella tænastur frá fyritøkuni, fíggingartreytir og áhugan hjá starvsfólki at starvast hjá fyritøkuni.

Í 2023 tók nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag tí avgerð um at Vinnuhúsið skuldi fara undir at veita limafyritøkum ráðgeving innan burðardygd. Sum arbeiðsgevarafelag, við omanfyri 500 limafyritøkum, hava vit ein stóran møguleika, og eisini eina stóra ábyrgd, at tryggja einar burðardyggar Føroyar. Vit vegleiða føroyskum fyritøkum í burðardyggum loysnum, umframt at vit støðugt arbeiða fyri góðum karmum, soleiðis at til ber at reka burðardygga vinnu.

Burðardygd merkist eisini í dagliga virkseminum í Vinnuhúsinum, har vit arbeiða miðvíst við at minka um okkara neiligu ávirkan á umhvørvi og samfelag. Í 2023 hava vit tikið fyrstu grundleggjandi fetini innan burðardygd, sum í stóran mun hava snúð seg um at finna neyðug hagtøl, dagføra mannagongdir og at gera hesa frágreiðing um burðardygd. Hóast vit ikki eru komin á mál á fleiri økjum, so eru vit glað fyri at vera komin í gongd og motiveraði til at halda áfram í arbeiðinum. Tað sum nú liggur fyri framman er at orða ein burðardygdarpolitikk, sum leggur grundina fyri, hvussu Føroya Arbeiðsgevarafelag arbeiðir við burðardygd og at seta nøkur málbar mál.

Vónin er, at henda fyrsta árliga frágreiðing um burðardygd fyri árið 2023 gevur tykkum innlit í okkara tilgongd at gerast enn meiri burðardygg.

Tórshavn, tann 3. septembur 2024

**Niels Winther**

Stjóri



# 2

# Um Føroya Arbeiðsgevarafelag

# Um Føroya Arbeiðsgevarafelag

Føroya Arbeiðsgevarafelag er meginfelag fyri føroyskar arbeiðsgevarar á privata arbeiðsmarknaðinum. Felagið er røddin hjá privatu vinnuni á vinnupolitiska økinum og arbeiðsmarknaðarøkinum. Føroya Arbeiðsgevarafelag varðar av 40 ymiskum sáttmálum á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Hesir sáttmálar fevna um meginpartin av privata arbeiðsmarknaðinum á landi umframt handilsskip og flogvinnu.

Visiónin er, at føroyskt vinnulív fær teir bestu møguleikarnar fyri at kappast, mennast og framleiða varandi virði. Sum arbeiðsgevarafelag hava vit ein stóran møguleika, og eisini eina stóra ábyrgd, at tryggja einar burðardyggar Føroyar. Vit vegleiða føroyskum fyritøkum í burðardyggum loysnum, umframt at vit støðugt arbeiða fyri góðum karmum, soleiðis at til ber at reka burðardygga vinnu.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevði við ársenda 2023 515 limafyritøkur. Limaskarin telur bæði fyritøkur, sum eru beinleiðis limir í Føroya Arbeiðsgevarafelagi, og fyritøkur, sum eru limir umvegis eina av fýra arbeiðsgevarasamskipanum:

- Føroya Handverksmeistarafelag
- Reiðarafelagið fyri handilsskip
- Arbeiðsgevarafelagið hjá Fíggjarstovnum í Føroyum
- Føroya Prentsmiðjufelag

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelagi telur 9 nevndarlimir. Hesir verða valdir av limunum í felagnum á árliga aðalfundi felagsins fyri trý ár í senn. Nevndin skal sambært viðtøkunum veljast soleiðis, at hon umboðar tær ymisku vinnugreinarnar og landið, so væl sum til ber.

Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur fasta umboðum í hesum nevndum og ráðum:

- ALS-stýrið
- AMEG-stýrið
- Arbeiðsumhvørvisráðið
- Dáturáðið
- Dugni-stýrið
- Fasti Gerðarrættir – nevndin
- Fasti Gerðarrættur – dómari
- Fróðskaparsetur Føroya – stýrið
- Javnstøðunevndin
- Kappingarráðið
- Sáttmálanevndir
- Studni - ráðgevandi nevnd
- Ungt virki
- Vinnusjúkugrunnurin - nevnd
- Yrkisútbúgvingarráðið

Harumframt er felagið vanliga umboðað í ymiskum arbeiðs- og strategibólkum, sum landið setur.

Vinnuhúsið er felagsheiti fyri virksemið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag, limum tess og teimum vinnugreinafeløgum, sum eru knýtt at Vinnuhúsinum á Óðinshædd. Tað er Føroya Arbeiðsgevarafelag, ið rekur Vinnuhúsið og hevur yvirskipaðu ábyrgdina av virkseminum. Í 2023 hava 11 starvsfólk arbeitt við ráðgeving og rakstri av Vinnuhúsinum. Hesi starvsfólk eru starvssett hjá Føroya Arbeiðsgevarafelagi, men veita eisini eftir avtalu ráðgeving og tænastur til hini feløgini í Vinnuhúsinum.

Tað eru 5 arbeiðsgevarafeløg og 10 vinnugreinafeløg knýtt at Vinnuhúsinum, hesi arbeiða við at fremja áhugamálini hjá einstaka felagnum. Feløgini eru sjálvstøðug feløg við egnari nevnd, sum leggur karmarnar fyri virkseminum í felagnum. Í vinnugreinafeløgunum kunnu eisini vera limafyritøkur, ið ikki eru limir í Føroya Arbeiðsgevarafelag. Tey 10 vinnugreinafeløgini eru:

- Bilasølufelagið
- Ferðavinnufelagið
- Føroya Ráfiskakeyparafelag
- Handilsvinnufelagið
- Havbúnaðarfelagið
- Havnar Handverksmeistarafelag
- KT-felagið
- Ráðgevarafelagið
- Samskifti
- Sjóvinnufelagið

Reiðarafelagið og Felagið Nótaskip hava eisini skrivstovuhøli í Vinnuhúsinum, men eru annars ikki partur av organisatiónini. Henda frágreiðingin um burðardygd snýr seg bara um virksemið hjá Føroya Arbeiðsgevarafelag og starvsfólkum tess. Tó verður virksemi, sum starvsfólkini eftir avtalu við Føroya Arbeiðsgevarafelag røkja fyri onnur feløg í húsinum eisini talt við.



# 3. ESG-lyklatøl

# ESG-lyklatøl

Burðardygd fevnir um fleiri viðurskifti og eitt altjóða felags heiti fyri hesi er "ESG", ið stendur fyri environmental, social and governance. Á føroyskum verða hesi viðurskifti nevnd umhvørvi, sosial og leiðsla. Til at máta burðardygd verða ESG-lyklatøl nýtt. Endamálið er at fyritøkur gera upp somu tøl á sama hátt, soleiðis at hesi kunnu samanberast millum fyritøkur.

| | ESG-lyklatal | Eind | Úrslit 2023 | Úrslit 2022 | Úrslit 2021 |
|---|---|---|---|---|---|
| **UMHVØRVI** | CO2e vav 1 | Tons CO2 | **0** | 0 | 0 |
| | CO2e vav 2 | Tons CO2 | **12** | 12 | 15 |
| | Samlað orkunýtsla | GJ | **131** | 137 | 133 |
| | Varandi orkukeldur | % | **50%** | 53% | 38% |
| **SOSIALT** | Ársverk | FTE[1] | **9,9** | 9,3 | 9,3 |
| | Kynsbýti (K) | % | **41%** | 40% | 46% |
| | Kynsbýti á leiðslustigi (K) | % | **50%** | 50% | 100% |
| | Lønarmunur millum kyn (M/K) | ferðir | **1,2** | 1,5 | 1,6 |
| | Starvsfólk í vardum starvi | % | **5%** | 5% | 5% |
| | Broytingar í starvsfólkahópi | % | **10%** | 32% | 11% |
| **LEIÐSLA** | Uppmøting til nevndarfundir | % | **83%** | 86% | 96% |
| | Kynsbýti í nevnd (K) | % | **11%** | 11% | 11% |

[1] *FTE stendur fyri Full-Time Equivalent*

ESG-lyklatølini fyri 2023 eru merkt av, at hetta er fyrsta árið, at Føroya Arbeiðgevarafelag arbeiðir við burðardygd. Manglandi hagtøl á ymiskum økjum hava við sær, at nøkur lyklatøl ikki eru við í hesi frágreiðingini, t.d. burturkast og sjúkradagar. Føroya Arbeiðsgevarafelag hevur heldur ikki ásett mál til 2030 enn, hetta verður gjørt í 2024, sum partur av arbeiðinum við burðardygdarpolitikkinum.

## 3.1 $CO_2$-útlát og orkunýtsla

Vinnuhúsið hevur einki útlát í vav 1 tá eingi akfør eru og húsið burturav er hitað við jarðhita. Hetta merkir at alt útlát frá bygninginum á Óðinshædd er í vavi 2.



Í 2023 og 2022 var útlátið 12 tons $CO_2e$ í vavi 2. Hetta er ein minking frá 2021 tá útlátið var 15 tons. Tíverri ber ikki til at útgreina hvussu stóran part av útlátinum hitapumpan eigur og hvat, ið kemur frá øðrum virksemi í húsinum t.d. teldur, ljós. Orsøkin er, at tað í verandi støðu bert er ein felags málari. Skal Vinnuhúsið hava betri innlit í hvørji øki eru orku-krevjandi og hvussu orkunýtslan kann optimerast, er tí neyðugt at fáa orkunýtsluna útgreinaða betri t.d. við einum egnum málara til hitapumpuna.

Føroyar hava sett sum langtíðar mál, at øll elorka skal koma frá varandi orkukeldum í 2030. Tó er enn langt á mál og í 2023 vóru 50% av framleiðsluni frá grønum orkukeldum.

Í 2023 er útlát ikki gjørt fyri vav 3 hjá Vinnuhúsinum, men frá 2024 er ætlanin at hava nakrar av teimum 15 bólkunum í vavi 3 við, so sum ferðing og burturkast.



## 3.2 Burturkast

Vinnuhúsið hevur tíverri ikki enn nøkur lyklatøl fyri burturkastmongdir ella hvussu stórur partur av burtur-kastinum verður endurvunnin. Tó eru fleiri átøk gjørd á burturkastøkinum í 2023. Nýggjar mannagongdir eru gjørdar fyri burturkast og íløga gjørd í nýggjar innandura skiljistøðir. Vegleiðingar um skiljing eru framleiddar til starvsfólk og eisini til uttanhýsis reingerðarfólk og tey, ið savna burturkast. Burturkast í Vinnuhúsinum verður nú skilt í:

- Papp og pappír at endurvinna
- Bleytt plast at endurvinna
- Glas at endurvinna
- Jarn at endurvinna
- Pant at endurvinna
- Serburturkast at endurvinna (tvs battarí, ljósperur, elektronikkur osfr)
- Restburturkast at brenna



## 3.3 Sosialt

Í 2023 eru beint undir 10 ársverk í Vinnuhúsinum. Ársverkini eru roknað uttan yvirtíð, tvs at starvsfólk hava í mesta lagi eitt FTE á 1. Tá so fá ársverk eru, kunnu broytingar í starvsfólkahópinum í summum árum vera lutfalsliga høgar, hóast tað kanska bert snýr seg um 1-2 starvsfólk. Í 2023 var broytingin í starvs-fólkahópinum 10%, sum er á leið tað sama sum í 2021. Í 2022 var broytingin væl størri, heili 32%. Kynsbýtið er rættiliga javnt við 41% kvinnum og 59% monnum. Á leiðslustigi er kynsbýtið 50%. Í 2023 eru 5% av ársverkunum vard størv. Vinnuhúsið vil vera eitt rúm-ligt arbeiðspláss og leggur seg eftir at skapa nøktandi karmar, so starvsfólk við serligum førleikum fáa góðar arbeiðsumstøður og kunnu trívast og mennast.

Í 2023 var lutfalsligi lønarmunurin millum kyn 1,2. Hetta merkir, at median lønin hjá monnum er 20% hægri enn medianlønin hjá kvinnum. Í 2022 og 2021 var munurin enn størri á ávikavist 1,5 og 1,6 ferðir. Tølini eru roknað út frá ársløn hjá starvsfólkum.

## 3.4 Leiðsla

Nevndin í Føroya Arbeiðsgevarafelag telur 9 nevndarlimir og skal sambært viðtøkunum veljast soleiðis, at hon umboðar tær ymisku vinnugreinarnar og landið, so væl sum til ber. Nevndarlimir verða aloftast valdir millum stjórar í limafyritøkum. Í 2023 vóru ein kvinna og átta menn í nevndini. Býtið millum kvinnur og menn í nevndini hevur verið óbroytt 11% seinastu trý árini. Skal javnstøða vera í nevndini er neyðugt at Føroya Arbeiðagevarafelag vísir á mangl-andi javnstøðu, tá nevndarlimir verða valdir. Eisini má fokus vera á lága talið á kvinnuligum stjórum. Millum 100 tær størstu limafyritøkurnar í Føroya Arbeiðs-gevarafelagi eru bert uml. 15% kvinnuligir stjórar.

Árliga eru 6-8 vanligir nevndarfundir í Føroya Arbeiðsgevarafelag, umframt serligir fundir í sambandi við samráðingar o.t.. Uppmøtingin til nevndarfundirnar í 2023 var 83%. Hetta er eitt vet lægri enn í 2022 tá uppmøtingin var 86%. Í 2021 var uppmøtingin 96%, men tá vóru bert fimm nevndarfundir hildnir, orsakað av COVID-19 farsóttini.



# Fylgiskjøl

# Fylgiskjal 1

## Vegleiðing til uppgerð av ESG-lyklatølum

| | ESG-lyklatal | Eind | Frágreiðing |
|---|---|---|---|
| **UMHVØRVI** | CO2e vav 1 | Tons CO2 | (Oljunýtsla * útlátsfaktorar) + (Nýtsla av f-gassum * útlátsfaktorar) |
| | CO2e vav 2 | Tons CO2 | (Elnýtsla * útlátsfaktorur) + (Fjarhitanýtsla * útláts-faktorur) |
| | Samla orkunýtsla | GJ | (Nýtsla av brennievnum [L] * orkufaktor [GJ/L]) + (Elnýtsla [MWh] * umrokningarfaktorur [GJ/MWh]) + fjarhitanýtsla [GJ] |
| | Varðandi orkukeldur | % | (Grønar orkukeldur / samlað orkunýtsla) *100% |
| **SOSIALT** | Ársverk | FTE | Fulltíðar starvsfólk + tímalønt starvsfólk + fyribils starvsfólk |
| | Kynsbýti (K) | % | Ársverk kvinnur / Ársverk * 100% |
| | Kynsbýti á leiðslustigi (K) | % | Ársverk kvinnur í leiðslu / Ársverk leiðsla * 100% |
| | Lønarmunur millum kyn (M/K) | ferðir | Median løn menn / Median løn kvinnur |
| | Starvsfólk í vardum starvi | % | Ársverk vard størv / Ársverk * 100% |
| | Broytingar í starvsfólkahópi | % | Fráfaring / Ársverk * 100% |
| **LEIÐSLA** | Uppmøting til nevndarfundir | % | (Nevndarfundir pr. nevndarlim) / (Nevndarfundir í alt * Nevndarlimir í alt) *100% |
| | Kynsbýti í nevnd (K) | % | (Kvinnur í nevnd) / (Nevndarlimir í alt) * 100% |

MEITILBERG.COM